VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL
Nr. 47 • týsdagur • 7. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo



*Her er føroyska ferðalagið á veg til India*

*Mynd Símun Jóannesarsson*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður um Indiaferðina:

# Skilagóð íløga fyri føroyskt vinnulív

**– Tað er mín greiða fatan, at henda ferðin til India hevur skapt nakrar møguleikar hjá føroyingum at luttaka meira virkið í altjóðaágerðini enn higartil, og tí skulu vit taka hesa vinnulívsferð við løgmanni á odda sum eina nýggja byrjan sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum kemur heimaftur í dag**

INDIAFERÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Í dag kemur føroyska vinnulívsnevndin við løgmanni á odda heimaftur, eftir at hava vitjað í India í 10 dagar. Skráin hevur verið sera fjølbroytt og rúgvusmikil. Vitjað hevur verið í 5 ymiskum býum í India. Ferðin byrjaði í New Delhi og endaði í Bombay.

Vinnusíðurnar hava tosað við nøkur av vinnulívsfólkunum, sum vórðu við á hesi spennandi ferð umframt Jóannes Eidesgaard, løgmann sjálvan.

Tað er ikki ókent í øðrum londum, at hægsti politiski leiðarin stendur á odda fyri vinnulívsfólki, ið fara út at kanna marknaðir. Hetta var so fyrstu ferð, at okkara løgmaður er brúktur í slíkum høpi og heldur Jóannes Eidesgaard, at hetta hevur verið ein góð byrjan í so máta. Og tað verður neyvan heldur seinastu ferð, at hetta verður gjørt stendur tað til løgmaður og til føroyska vinnulívið, sum eru samd um, at Indiaferðin hevur verið sera væleydnað.

### Fingið nógv burtur úr

– Tað er mín greiða uppfatan, at hesi vinnulívsfólkini eg havi verið saman við í góða viku, hava fingið væl burtur úr og fingið nøkur upplivilsi, sum tey fara at byggja víðari á. Tey hava havt nógvar áhugaverdar samrøður. Eg veit tó ikki, hvat fer at spyrjast burtur úr ítøkiliga, men tað er alt, sum bendir á, at henda ferð hevur verið ein skilagóð íløga fyri føroyskt vinnulív. Bara tað at man fær hugburðin til at flyta seg frá tí heimliga til at síggja, at møguleikar liggja aðrastaðni enn heima hjá okkum sjálvum, er í sjálvum sær eitt frambrot, tí tað eru jú hesi fólkini, sum í dag sita á teimum týðandi postunum í vinnulívinum, at tey kanska nú fara at hugsa øðrvísi, sum ger, at onnur fara at hugsa øðrvísi.

Tað er mín greiða fatan, at henda ferðin hevur skapt nakrar møguleikar hjá føroyingum at luttaka meira virkið í globaliseringini enn higartil.

Løgmaður sigur seg annars vera kløkkan av, at ferðin til India hevur fingið negativa og misvísandi umrøðu í Føroyum, tí veruleikin er beint tann øvugti. – Spyrjið vinnulívsfólkini, hvat tey hava fingið burtur úr ferðini, og tit fáa eina heilt aðra mynd. Um fyritøkurnar, sum hava verið við í India, eru úr 1. ella triðju deild vil eg ikki fyrihalda meg til. Eg haldi, at luttakararnir á Indiaferðini hava verið kompetent og góð umboð fyri føroyskt vinnulív.

– Globaliseringin er ikki ein spurningur um keyp og sølu, soleiðis sum vit vanliga hugsa. Altjóðagerðin snýr seg um at virka saman, har báðir partar hava fyrimunir. T.d. kunnu føroysk virki fáa kostnaðar- og vitanartungar uppgávur gjørdar í India, soleiðis at man seinni kann fáast við nakað annað í Føroyum. At man lyftir arbeiðsplássini heima hjá sær sjálvum upp á eitt hægri støði. Tað eru ótald dømi um, at danskar og norðurlendskar fyritøkur seta seg niður í India. Tað er tí, at man sær stórar fyrimunir við hesum.

Løgmaður heldur tað var rætt at velja India framum t.d. Kina. Bæði Kina og India eru áhugaverd. Men vit mettu at málsligu forðingarnar vera minni í India. At India er áhguaverd í dag talar tann sannroynd fyri, at Ísland júst hevur latið upp sendistovu í India. Tað má vera tí, at tey leggja stóran dent á India.

### Nýggjur partur av løgmansuppgávuni

Hvat hevur túrurin havt at siga fyri løgmann!

– Hetta er so ein nýggjur partur av uppgávuni hjá løgmanni. Eg havi kent tað sum eina góða og rætta uppgávu at hjálpa vinnulívinum við at gera mítt til at lata hurðar upp. Kann eg vera medvirkandi til, at føroyskar vinnur kunnu lyfta seg upp enn meira, so er ferðin væleydnað.

Fyri Jóannes Eidesgaard hevur ferðin eisini verið ein seta stór uppliving og hevur givið honum nógv gott í beinið. – India er eitt ótrúliga samansett land. Fólkið er ómetaliga blítt. Her er stórur munur millum rík og fátækk. Her upplivir tú stórar mótsetningar. Fyrst sær tú øgilig háhús fyri so at síggja fólk búgva á gøtuni. Tað sosiala gapið er tí sera vítt. Men her er eisini eitt blómandi vinnulív, sum vit í Føroyum kunnu fáa gleði av. Og tað haldi eg henda ferðin longu hevur prógvað. Nú vil tíðin so vísa, hvat fer at koma burtur úr.

# Samvinna við India stóran týdning fyri okkum

**– Eg havi fingið staðfest, at tað ber til at arbeiða saman við indarum, og vit kunnu brúka sambondini vit hava fingið. Vit hava fingið kontaktir innan KT, sum vit skulu til at menna víðari sigur stjórin á Elektron, Niels Christian Nolsøe**

INDIAFERÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Løgmaður her saman við starvsfólki hjá Vónini, sum í løtuni er á indiskari netaverksmiðju og hevur eftirlit við arbeiðinum at gera partar av stórari nót*

– Tað er sera týdningarmikið, at vit síggja, hvat hendur í heiminum rundan um okkøum, ikki minst fyri at fáa ein varhuga av, hvar vit sjálvi eru í øllum hesum sigur Niels Christian Nolsøe, stjóri á Elektron, sum hevur verið við í føroyska ferðalagnum í India.

Hann heldur fyri, at nógv gott er komið burtur úr ferðini: – Skal eg tosa fyri mína egnu bransju, so hava vit fingið staðfest, at India er sjálv softwarefabrikkin í heiminum. Sera nógv av softwarenum í øllum heiminum verður framleitt í India. Og tí hava tær flestu stóru KT fyritøkurnar í heiminum so sum Micosoft, IBM osfr. sínar menningarstøðir her í India.

Hesin túrurin hevur víst, at vit í Føroyum hava ikki borið okkum rætt at. Eg visti undan ferðini, at India hevði stóran týdning á KT-økinum, men núgstaðni skilji eg hví. India hevur stóran týdning fyri, hvussu okkara vinna fer at menna seg. Vit í Føroyum kunnu fáa stóra nyttu av gongdini í India. Okkara kappingarneytar brúka India. Íslendingar og londini rundan um okkum hava leingi troytt samstarv við India til egnan fyrimun. Tey hava tætt samstarv við indarar, og tað verður so sanniliga eisini neyðugt hjá okkum, um vit skulu yvirliva í framtíðini sum KT vinna.

Niels Christian vísir á, at tey hava fingið nakrar týðandi kontaktir í India. Hvussu tað so fer at enda vil tíðin vísa. Hann sigur seg hava fingið bilbukt við mentalar forðingar. Og hann sigur seg hava fingið fult forstáilsi fyri, at vit mugu broyta mátan at arbeiða uppá.

– Eg havi eisini fingið staðfest, at tað ber til at arbeiða saman við indarum, og vit kunnu brúka sambondini vit hava fingið. Vit hava fingið kontaktir innan KT, sum vit skulu til at menna víðari.

Talan kann m.a. verða um at lata fyritøkur í India gera partar av vøru, sum skal gerast í Føroyum, men eisini har tað eru ætlanir um at gera ymiskt til europeiska marknaðin. Vit hava í Føroyum ikki nóg nógv fólk til at taka sær av øllum uppgávunum, og tá kann samstarv við m.a. India koma væl við.

### Kina rætta valið

Men hví ikki heldur fara til Kina ella til londini í OECD, sum hevur verið frammi í fjølmiðlunum?

–Fyri okkum er India meira áhugavert enn Kina, tí India er softwarefabrikkin í heiminum. Kina er meira hardwarefabrikkin, har tú framleiðir fartelefonirnar og teldurnar, og tað er ikki so áhugavert fyri okkum á Elektron.

Tað hevur eisini nógv at siga, at meðan India er eitt demokrati, so er Kina eitt diktatur. Og demokrati er ein fyrimunur og meira haldbart í longdini, hóast tað kann taka eitt sindur longri tíð.

Niels Christian Nolsøe er sannførdur um, at tað er rætt at gera slíkar vinnuferðir og til tey, sum eru skeptisk sigur hann, at tað uttan iva eru føroyingar, sum eru ivasamir, um tað er skilagott at fara av landinum í heila tikið. –Um man trýr tað er betri at sita hendur í favn heima í Føroyum og lata tingini henda rundan um seg, so kann eg bert siga, at vit tvørturímóti mugu fara út um bøgarðarnar at síggja heimin uttan um okkum. Hetta er tí ikki tann seinasta ferðin av slíkum slag. Vit øll, sum eru við á hesi ferðini, eru samd um, at hetta var eitt gott initiativ og hava heitt á løgmann um at endurtaka hetta. Hetta er avgjørt neyðugt, um Føroyar skulu vera við í kappingini. At vit síggja, hvussu tingini eru í heiminum rundan um okkum.

# Koma heimaftur við somu upplivingum

**– Tað hevur alstóran týdning at kunna senda lyklapersónar í vinnuni avstað saman heldur Áki Johannessen á Menningarstovuni**

INDIAFERÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Áki Johannessen umboðaði Menningarstovuna á Indiatúrinum. Hann hevur verið við til at fyrireika fleiri slíkar ferðir í útlandinum eitt nú í baltisku londunum, Ruslandi og Íslandi. Hann sigur, at tað er sera umráðandi at fyrireika slíkar túrar ikki minst fyri lyklapersónar í føroyskum vinnulívi. Hetta at so nógvir vinnulívsmenn eru saman á slíkari ferð ger jú eisini, at teir koma heimaftur við somu upplivingum, sum teir so kunnu breiða út í sínum fyritøkum og arbeiðsumhvørvum. Tá tú hugsar um, hvussu lítið land Føroyar eru, so skal rættiliga lítið til fyri at venda skútuni. Hann roknar heldur ikki við, at tað finst nakað annað land, sum megnar at fáa 30 av sínum mest framstandandi vinnulívsfólkum við á eina slíka ferð. Tí metir hann Indiaferðina, sum bæði neyðuga og skilagóða.

– Tá vit tosa um altjóðagerð, so hugsa vit kanska mest um Kina, Baltikum, Rusland osfr. Tað er nógv lættari at tosa við ein indara enn ein kinesara, tí her tosa øll enskt. Tey eru eisini sera áhuga í at tosa um fiskivinnusamstarv, tí tey troyta als ikki allar fiskastovnarnar, tí tey hava ikki førleikan. Men leggja vit okkara og teirra fyrimunir saman, so kunnu vit koma langt. Kunnu vit menna okkum sjálvi og okkara samstarvspartnarar antin teir eru í India, Kina ella Baltikum, so standa vit nógv sterkari.

Tað tekur sjálvandi tíð at seta í verk nýggjar ætlanir men øll koma aftur við nógvum ríkum upplivingum og kenslum og kontaktum, sum kunnu blíva til nakað uppá sikt. Tað er ikki bara tað tú sær á slíkari vitjan, sum er gevandi. Eisini hetta at fólk eru saman og uppliva nakað nýtt hevur týdning líka mikið, hvar tú er stæddur.

Áki Johannessen heldur tí, at vit føroyingar eiga tí avgjørt at gera fleiri líknandi túrar, tó at teir ikki allir nýtast at líkjast og vera so breiðir. Teir kunnu eisini umfata eina einstaka bransju. Áki leggur eisini dent á ta sannroynd, at vit, sum eru vaksin upp í tveimum mentanum, tí føroysku og tí donsku, hava kanska eisini lættari við at umstilla okkum.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum:

# Indiavitjanin kann flyta mørk

**Eins og kanningarferðin hjá Pløjen amtmanni í Hetlandi gjørdi tað fyri 150 árum síðani – kann indiavitjanin eisini flyta mørk**

INDIAFERÐIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Fyri 150 árum síðani var tað ein kanningartúrur, sum Pløjen amtmaður skipaði fyri í Hetlandi, ið setti gongd á føroyska fiskivinnu. Tað var tá, at føroyingar lærdu at fiska. Indiaferðin kann vera startskotið til, at vit duga at fóta okkum í altjóðagerðini. Slíkar ferðir sum henda til India er við til at flyta mørk og skapa grundarlag fyri nýggjari menning sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum júst afturkomin av drúgvari kanningarferð í India.

– Vit áttu at gjørt meira á hesum øki. Tað, at løgmaður er við, ger, at tú fær latið upp heilt aðrar hurðar, enn um tú bara fór einsamallur. Tað skal vera mín inniliga áheitan á eitt nú politisku skipanina í Føroyum, at fleiri slíkar ferðir verða gjørdar komandi árini. At løgmaður ella landsstýrismenn í størri mun fara út í stóru verð saman við føroyskari vinnu. Sjálvandi er tað vinnan, sum skal syrgja fyri, at tað kemur nakað ítøkiligt burtur úr. Men ein ráðharri hevur ein øgiligan møguleika fyri at lata hurðar upp. Hetta sóu vit t.d. í Cochin í Suðurindia, har løgmaður varð móttikin og uppvartaður sum ein forseti.

Tað hevur tí ómetaliga nógv at siga, at politiska skipanin fylgir við.

Jan Mortensen sigur, at tey einstøku virkini sjálvi mugu siga, hvat tey hava fingið burtur úr, men sjálvur heldur hann, at samanumtikið er sera nógv gott komið burtur úr hesi vitjan. Bæði ítøkilig mál og mál, sum liggja í stoypiskeiðini.

Tað er India, sum er in í løtuni, og tað er neyvan heldur av tilvild, at amerikanski og australski forsetarnir júst hava verið her á odda fyri stórum vinnulívsnevndum. Ísland hevur júst latið upp sendistovu her, tí teir síggja, at her liggja stórir møguleikar. Jan Mortensen vísir á, at vit longu hava dupultskattasáttmála við India. Tað er eingin trupulleiki at flyta fisk til India og virka hann har og síðani flyta lidnu vøruna út aftur. So leingi tú innflytur fyri at útflyta er eingin trupulleiki vísir hann á sum dømi um, hvat kann gerast og vísir á, at samanumtikið eru spírar lagdir. Eitt nú hevur felagið Simprentis fingið fótin innan fyri í indisku oljuverðini, Thor í Hósvík hevur fingið tætt samband við skipafyritøkur, Elektron og peningastovnarnir hava fingið samband við fyritøkur, sum vilja samvinna osfr.

# Føroyingur læra indarar at leita eftir olju

**Lítla føroyska fyritøkan Simprentis, sum heldur skeið í oljufrálæru, hevur eftir øllum at døma fingið samstarv við risastóra almenna indiska oljufelagið, ið hevur 350.000 fólk í arbeiði.**

INDIAFERÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Ólavur Ellefsen er sera væl nøgdur við úrslitið av Indiaferðini*

Millum luttakararnar á Indiaferðini var eisini Ólavur Ellefsen, stjóri í fyritøkuni Simprentis, sum nú í fleiri ár hevur roynt seg á einum fyri føroyingar heldur óvanligum marknaði, nevniliga skeiðvirksemi í oljuvinnuni. Eftir at hava verið við til at útvikla eitt serstakt teldu-programm, sum hevur til endamál at læra fólk grundreglar og innlit í eitt nú oljuleiting, hevur Ólavur Ellefsen gjørt eitt stórt arbeiði fyri at marknaðaføra hesa heldur sjáldsomu vøruna í útlandinum. Hann hevur verið í fleiri londum og hildið skeið eitt nú í Suðuramerika. Hesaferð stóð skjóttvaksandi og risastóra indiska oljuvinnan fyri tørni. Almenna indiska oljufelagið hevur 350.000 fólk í arbeiði.

Ólavur Ellefsen sigur, at tað er øgilig styrki at hava løgmann við fyri at lata hurðar upp. – Eg hevði m.a. fund við leiðsluna í ONGC, sum er tað stóra almenna oljufelagið og sum stendur 80% av allari oljuframleiðsluni. Ein av orsøkunum til at gekk so væl og skjótt hjá Ólavi at koma í samband við nakrar av ovastu leiðarunum har var tann, at løgmaður hevði boðið teimum til móttøku kvøldið fyri.

– Tað hevur gingið sera væl. Eg havi verið til fýra fundir og tríggir teirra hava verið sera góðir. Hóast hann ikki hevur undirskrivað sáttmála, so kennir Ólavur tað so, at hann hevur gjørt tríggjar sáttmálar undir vitjanini og hesir fevna um skeið og venjing innan olju í telduhøpi.

Ólavur sigur, at India er sera áhugavert at vitja, tí tey leggja seg nógv eftir at útbúgva fólk. Tey tosa væl enskt, og føroyingar skilja helst betri tann indiska kulturin enn t.d. tann kinesiska, um valið skuldi staðið millum hesi londini. Ólavur heldur tað vera týdningarmikið eisini fyri eina lítla fyritøku sum hansara at fylgja við og vera úti um seg úti í heimi. – Eg havi hoyrt um atfinningar móti okkara vitjan í India heimaífrá. Og til tað kann eg bert siga, at tað er ótrúliga vánaligt, at tað eru røddir í Føroyum, sum hava so ilt av, at man fer út í verðina. Vit rinda sjálvir fyri ferðina, og eg meti hetta at vera eina skilagóða íløgu fyri mína fyritøka, so tann atfinningarnar móti ferðini, eru eitt skot langt við síðuna av.




*Nógv varð gjørt burtur úr løgmanni og føroysku vinnulívsfólkunum í Cochin sum er høvuðs fiskivinnubýurin í India.*

---

Stjórin í Føroya Tele:

## Fingið altjóðagerðina undir húðina

**– Vit hava fingið nakrar sera positivar og spennandi kontaktir. Hjá okkum er tað ikki so nógv ein spurningur, um vit her og nú skulu innella útflyta nakað. Harafturímóti er tað týdningarmikið at síggja, hvussu nógvir møguleikar eru fyri partanaraskapi og samstarvi**

INDIAFERÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Ein av teimum tungu vinnulívsmonnunum, sum eru við í Indiaferðalagnum er Andras Róin, stjóri í Føroya Tele. Hann sat í bussinum á veg frá milliónabýnum Bombay og út á flogvøllin, tá vit hittu hann í telefonini.

Andras sigur seg hava fingið nógv burtur úr. – Eg komi ikki heimaftur við nakrari ávísari avtalu, men her eru sera nógvir møguleikar fyri samstarvi. At koma heimaftur við so nógvum upplivingum hevur fyri mín part gjørt, at altjóðagerðin er komin inn undir húðina. Soleiðis kenni eg tað. Hetta er sjálvandi eitt sera stórt land, men eg eri sannførdur um, at vit kunnu læra nógv av India. Vit eru ikki frammanfyri teir. Vit skulu veruliga taka okkum saman og lata eyguni upp og síggja, hvat fyrigongur uttanfyri okkara egnu klettar. India er nógv meira globaliserað, enn Føroyar eru tað. Tað er eitt sindur hugstoytt, tí í veruleikanum eru vit als ikki við í hesi globalisering.

Andras Róin vísir á, at uttan mun til um vit her og nú kunnu innflyta ella útflyta nakað, so er samstarv tað mest týdningarmesta. Aftrat tí er tað eisini týdningarmikið, at so nógv vinnulívsfólk umboðandi so nógvar ymiskar bransjur kunnu vera saman og hava góðar umstøður at diskutera tingini. Tú fært ein annan máta at vera saman uppá, og nú vit koma heimaftur, hevur tú eina størri fatan av, hvat aðrir føroyingar gera eisini.

– Vit hava lyndi til heima at sita og stríðast móti hvørjum øðrum, antin talan er um grannan ella grannabygdina. Tá tú er í Bombay millum allar hesar milliónirnar, so sær tú, hvussu nógv tað hevur at siga at kunna standa saman. Saman hava vit ein møguleika. Her í India við øllum milliónunum ber til at standa saman og fáa tað besta burtur úr. Tað kunnu vit læra av og her ikki minst toleransu.

Føroya Tele stjórin sigur seg hava fingið nakrar sera positivar og spennandi kontaktir. – Hjá okkum er tað ikki so nógv ein spurningur, um vit skulu innella útflyta nakað. Men harafturímóti at síggja, hvussu nógvir møguleikar eru fyri partanaraskapi og samstarvi. Tað eru nógvar indiskar fyritøkur, sum arbeiða globalt. Tær eru sera opnar og eg havi kent tað so, at tær eru sera hugaðar fyri samvinnu við okkum í Føroyum eisini. Enn er so einki undirskrivað, men eg skal ikki útiloka, at her fer at henda nakað.

# Løgmaður læt nógvar dyr upp fyri okkum

**– Ferðin hjá føroyskum vinnulívsfólki í India hevur verið sera væleydnað og vit hava fingið nógv burturúr, sigur Egil Olsen, stjóri í Faroe Marine Biotech**



*Ferðin hjá føroyskum vinnulívsfólkum í India hevur verið sera væleydnað, men ein høvuðsorsøkin til tað er, at løgmaður var við, tí hann læt hurðar upp fyri okkum, sum annars høvdu verið afturlætnar, sigur Egil Olsen, stjóri í Faroe Marine Biotech*

**FØROYSKT VINNULÍV Í INDIA**

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta hevur verið ein veldug succes.

Egil Olsen angra, angrar ikki eina løtu, at hann tók av tilboðnum um at fara til India saman við eini stórari føroyskari sendinevnd við sjálvum Løgmanni á odda.

Hesar seinastu dagarnar hevur ein stór, føroysk sendinevnd av vinnulívsfólki ferðast í India við tí endamáli at vita um tað ber til føroyskum vinnulívi at troyta nýggjar leiðir í hesum velduga landi í fjareystri.

Egil Olsen, stjóri í Faroe Marine Biotech, er ein av teimum útvið 30 føroysku vinnulívsfólkum, sum gjørdi av at taka av tilboðnum at vera við á ferðini.

Føroyska sendinevndin kemur aftur í dag og Egil Olsen kann heilt stutt staðfesta, at ferðin hevur verið avbera væleydnað.

Men hann er fullvísur í, at tað, sum hevur gjørt ferðina so væleydnaða, er, at tað var sjálvur løgmaður, sum stóð á odda fyri sendinevndini.

– Eg síggi ikki føroyskan uttanríkisplitikk soleiðis, at vit skulu leggja okkum út í politisk mál úti í heimi. Eg síggi føroyskan uttanríkispolitikk meiri soleiðis at vit skulu brúka hann til at knýta handilssambond, sigur hann

- Og í hesum føri má eg ásanna, at Løgmaður hevur av sonnum latið dyr upp fyri okkum, sum annars høvdu verið afturlætnar.

Hann sigur, at tað, at løgmaður var við, gav ferðini ein formligan dám.

– Allastaðni varð hann móttikin sum ein statsmaður og indarar lótu allar dyr upp. Og saman við donsku sendistovuni í India, hevur løgmaður gjørt sítt til, at vit sluppu at hitta tey røttu fólkini.

– Skuldu vit farið avstað sum einstaklingar, høvdu vit als ikki fingið so nógv burturúr. Men løgmaður og danska sendistovan hava gjørt eitt stórt arbeiði at leggja ferðina til rættis og við at syrgja fyri at vit hittu tey røttu fólkini.

## Størsta forðingin er sálarlig

Sostatt ger Egil Olsen øllum teimum til skammar, sum av ymsum orsøkum hava funnist at ferðini. Bæði vinnulívsfólk, íslendskur professari og politikararar hava niðursáplað ferðina av ymsum orsøkum. Ein atfinning hevur verið, at India er eitt tað torførasta landið yvirhøvur at samstarva við, tí tað er ikki limur í EFTA og hevur so nógvar handilsforðingar, at tað er mestsum burturspilt arbeiði yvirhøvur at royna at koma upp í part har.

Somuleiðis hevur løgmaður verið fyri atfinningum tí at hann skal hava standa á odda fyri eini ferð, sum hesari, ið fammanundaner skýrd at vera nyttuleys.

– Eg skilji ikki atfinningarnar og eg má viðganga, at tær harma meg, sigur Egil Olsen.

Hann sigur, at hann hevur havt nakrar langar og strævnar dagar í India og hann hevur hitt nógv fólk, men handilsforðingum hevur hann ikki hitt.

– Veruleikin er nokk tann, at tær forðingar, sum eru, eru fyri tað mesta í hugaheiminum á summum politikarum, vinnulívsfólki og serfrøðingum annars, tí veruligar eru hesar forðingar ikki. Talan er sostatt meiri um sálarligar forðingar enn um ítøkiligar forðingar.

Egil Olsen vísir á, at verða vørur fluttar úr Føroyum til India at verða meiri virkaðar og síðani útfluttar aftur til USA, er tollurin onkustaðni ímillum 0 og 4%.

– Tað er heilt vanligt, at vørur verða fluttar úr Evropa til India at verða virkaðar víðari og so verða tær sendar aftur á marknaðin í Evropa.

Summi hava víst á, at tað hevði loyst seg betri at farið eina slíka ferð til Kina.

Egil Olsen sigur, at fyrimunurin við samstarvi við India, framum samstarvi við Kina, er júst tann, at í India er arbeiðsmegin ógvuliga væl útbúgvin á nógvum økjum. Harafturat duga øll enskt og duga sostatt at samskifta á enskum og tað er ikki altíð støðan í Kina.

## Stórir møguleikar hjá føroyskum vinnulívi

Men kunnu vit so fáa burtur úr einum samstarvi við India?

– India er eitt ómetaliga stórt land og tað, sum vit mest fáa fatan av, er, hvussu fátækt og tilafturskomið landið er.

– Men veruleikin er eisini ein heilt annar. Veruleikin er, at India er eitt land við eini sera vælútbúnari arbeiðsmegi á nógvum økjum. Samstundis eru teir fult út førir fyri at samskifta á enskum og teir eru vanir at arbeiða á altjóða støði. Og so er talan um eitt land við sera sera lágum kostnaðarstøði.

Hann sigur, at júst hetta eru grundleggjandi viðurskifti í sambandi við eitt sínamillum samstarv ímillum India og Føroyar.

– Tí síggi eg India sum ein sera stórur møguleiki hjá føroyskum vinnulívi, leggur hann afturat.

Men hann sigur, at tað er eitt samstarv, sum kann ganga báðar vegir, soleiðis at føroyingar kunnu fáa nógv burturúr einum samstarvi við India, men teir kunnu eisini fáa nakað burtur einum samstarvi við okkum.

Egil Olsen sigur, at sjálvur var hann mest áhugaður í at hitta indarar, sum arbeiddu í fiskivinnuni og serliga innan biotøkni.

– Júst á hesum øki eru indarar sera frammaliga og biotøkni er ein ídnaðaður, sum er í ógvuliga stórari menning í India.

Á ferðini í India hitti hann fyritøkur í India, sum arbeiða innan biotøkn og stjórin í Faroe Marine Biotech hevur eisini fingið ítøkiligt úrslit burturúr.

– Tað eru øki, har indarar hava ein serligan kunnleika, sum vit hava brúk fyri og kunnu læra nakað av.

Hann nevnir sum eitt dømi, at Faroe Marine Biotech hevur brúk fyri at gera ymsar kanningar í sambandi við framleiðslur av ymsum slagi.

– Men tær kanningar kunnu gerast á líka høgum støði í India, sum í Norðanlondum, men tað er bara nógvar ferðir bíligari at gera tær í India.

– Men Indarar hava eisini serliga vitan á ymsum øki innan biotøkni, sum vit ikki hava. Eitt nú hava teir kunnleika um serligar eginleikar, sum smáverur í køldum sjógvi hava í sambandi við ymsar framleiðslur. Teir hava eisini hugskot um, hvussu hesir serligu eginleikar kunnu gagnnýtast í eini framleiðslu og ta vitanina eru teir áhugaðir í at samstarva við okkum um. Tað kann geva okkum ein heilt serligan møguleika, heldur Egil Olsen.

– Hinvegin hava vit eina serliga vitan innan tøkni, sum teir kunnu fáa gagn av. Sostatt kunnu báðir partar fáa nyttu burturúr einum samstarvi, sigur stjórin í Faroe Marine Biotech.

Hann Egil sigur, at hann og indarar eru samdir um at kanna kanna møguleikarnar fyri samstarvi á ymsum økjum.

- Møguleikin er sera stórur í India. Tað er bara at finna teir og at taka teir, sigur Egil Olsen.

# Rætta løtan hjá føroyingum at gera vart við seg í India

**– Føroyskt vinnulív hevur stóran møgleikar í India og hetta er akkurát rætta løtan, sigur Michael Sternberg, danskur sendiharri í India**

FØROYSKT VINNULÍV Í INDIA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Føroyskt vinnulív hevur stórar møguleikar í India.

Tað heldur Michael Sternberg, danskur sendimaður í India.

Akkurát hann hevur havt ein týðandi leiklut í arbeiðnum at fyrireika ferðina hjá føroysku sendinevndini í India.

Í samrøðu við Sosialin letur hann sera væl at ferðini og hann heldur, at nógv er komið burturúr.

Undir øllum umstøðum kann vera ómetaliga kveikjandi at síggja við egnum eygum, hvussu landið er, so bara tað í sær sjálvum hevur sera stóran týdning

Hann vísir á, at India er ein miðdepil í alheimsgerðini og tað er landið við tí stóra búskaparliga vøkstrinum yvir øllum øðrum londum.

– Tað hava fyritøkur um allan heimin ásannað. Tað hava eisini danskar fyritøkur ásannað og nú hevur føroyskt vinnulív somuleiðis ásannað tað.

Tí skilir hann ikki atfinningarnar ímóti, at føroyskt vinnulív fer til India við løgmanni á odda, tí handilsforðingar skulu gera tað so torført at samstarva við India

– Tey, sum siga slíkt, eru fólk, sum als ikki kenna viðurskiftini í India. Hví halda tit, at allir heimurin vil sleppa til India. Flogfør flúgva í stríðum streymum til India við útlendskum vinnulívsfólki úr øllum heiminum. Tað ber illa til at fáa eitt hotelkamar, tí tað er so upptikið. Orsøkin til at útlendsk vinnulívsfólk standa í longum raði og banka á dyrnar fyri at sleppa til India, er neygvan tann, at handilsforðingar gera tað ómøguligt at samstarva, sigur Michael Sternberg.



*Hetta er rætta løtan hjá føroyingum at banka á dyrnar í India, tí landið er í eini veldugari broytingartíð, sum nýliga er byrjað og sum fer at standa við í nógv ár afturat, sigur Michael Sternberg, indiskur sendiharri í India*

### Rætta løtan

Hann sigur, at India hevur verið í eini veldugari broytingartíð seinastu 15 árini og síðani hendan stjórnin tók til í fjør, er kanska enn meiri ferð sett á broytingarnar.

– Tað er bara at hyggja eftir indiska virðisbrævamarknaðinum og tað floymir inn í landið við útlendskum íløgum úr øllum heiminum, bæði úr Evropa, USA og aðrastaðni.

Hann vísir á, at indiski búskapurin er sera sterkur. Men hann vísir eisini á, at hóast tað gongur skjótt, so er menningin enn á byrjunarstigið.

– India er á sama byrjunarstigi, sum Kina var á fyri 10 árum síðani. Tí er hetta akkurát rætta løtan at gera seg galdandi hjá føroyskum vinnulívi, tí hetta er ein menning, sum fer at vara í nógv ár enn.

### Nógv at samstarva um

Danski sendiharrin heldur, at tað er á nógvum økjum, at føroyingar og indarar kunnu fáa gagn av einum felags samstarvi.

– Tað veri seg heilt frá oljuvinnuni umvegis biotøkni til vørur úr ull og skinnum.

Men hann heldur, at tað, sum hevur størstan týdningin í løtuni, er, at føroyskt vinnlívsfólk hava sæð India og indiskt vinnulív við egnum eygum og at tað nú er latið upp fyri einum samskifti landanna millum, sum kemur at halda fram og at mennast í langa tíð framyvir.

Michael Sternberg heldur, at tað hevur havt stóran týdning, at sjálvur løgmaður hevur staðið á odda fyri føroysku sendinevndini.

– Tað hevur givið ferðini ein formligan dám og hevur gjørt tað munandi lættari at sleppa at hitta tey røttu fólkini. Tað hevur gjørt tað lættari at latið dyr upp og við hjálp frá sendistovuni, er føroyska sendinevndin sloppin allastaðni, har hon vildi sleppa.

– Allastaðni, har vit hava verið, hava vit fingið eina ómetaliga vinarliga og formliga móttøku og vit hava hitt politikarar og vinnulívsfólk, sigur Michael Sternberg.

---

# Føroyskt vinnulív stórar møguleika í India

**Bæði á íløguvirkinum Notio og á Ullvirkinum í Vági síggja tey stórar møguleikar í at samstarva við India**

FØROYSKT VINNULÍV Í INDIA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Her eru heilt avgjørt møguleikar hjá føroyskum vinnulívi.

Bæði Vilhelm Petersen, stjóri í íløgufelagnum Notio og Árni Brattaberg á Ullvirkinum í Vági, eru sera væl nøgdir við ferðina hjá føroysku sendinevndini í India.

Vilhelm Petersen sigur, at ferðin er sera væl fyrireikað og hetta er heilt avgjørt ein møguleiki hjá føroyskum vinnulívi.

– Tað er ongin ivi um, ferðin hevur verið tað vert, sigur hann.

Heldur ikki Vilhelm Petersen vil kennast við tær handilsforðingar, sum tað hevur verið sagt, skulu gera tað næstan ómøguligt at samstarva við India.

– Tað er ikki allur sannleikin. Tað er neyvan nakar sum hugsar sær, at føroyingar skulu hava tann stóra útflutningin til India. Men verða vørur fluttar til India at verða virkaðar og síðani fluttar aftur á marknaðin í Evropa, eru ongi avgjøld yvirhøvur, sigur Vilhelm Petersen.

Hann vísir kortini á, at onki kemur av sær sjálvum,



*Árni Brattaberg*



*Vilhelm Petersen*

so hóast møguleikarnir eru stórir, er tað avgjørt neyðugt, at føroyskt vinnulív sjálvt ger eitt arbeiði fyri at fáa nakað burturúr.

Hann heldur, at tað stendur fyrst og fremst til føroyskt vinnulív sjálvt, um nakað skal spyrjast burturúr.

– Men hjá teimum, sum vilja gera nakað við tað, eru avgjørt møguleikar, heldur Vilhelm Petersen.

Serliga hevur stjórin í Notio hugt eftir samstarvi á fiskivinnuøkinum.

Íløgufelagið Notio er ein stórur partur í Kollafjord Pelagic og nettupp í tí sambandinum, sær Vilhelm Petersen stórar møguleikar.

Ein møguleiki kann verða at senda uppisjóvarfisk til India at vera virkaðan víðari, eitt nú at skera til flak og síðani senda hann aftur á marknaðin í Evropa.

### Sera jaligt

Eisini Árni Brattaberg á Ullvirkinum í Vági, letur væl at.

– Tað hevur verið sera jaligt og eg haldi avgjørt, at vit hava fingið nakað burturúr.

Hann sigur, at innan hansara øki, eru indarar serliga frammarlaga at viðgera skinn.

– Tað er framúr handverk og hartil er kostnaðarstøðið lágt, sigur hann.

Hann hevur fingið samband við indiskar fyritøkur á hesum øki og møguleikar eru avgjørt til staðar fyri sáttmálum.

– Nú stendur tað mest til mín sjálvan um nøkur avtala við indarar skal spyrjast burturúr, sigur Árni Brattaberg.

– Sjálvur gera føroyingar ikki so nógv burturúr skinnum, men hetta er eitt øki, sum indarar hava sera stóran kunnleika til, sigur hann.

Ein møguleiki kann vera at Árni Brattaberg fer at keypa føroysk seyðaskinn í heyst og fer at senda tey til India til viðgerðar.

Janus Petersen, Føroya Banki:

# Hvør av øðrum læra kann




*Janus Petersen, bankastjóri og Bergur Poulsen frá Havsbrún vitja indiska sildamjølsverksmiðju*

**– India er sera samansett, tað er bæði eitt menningarland og eitt ómetaliga ríkt land. Tað kann læra okkum sera nógv um kunningartøkni, meðan vit kunnu geva teimum nógv á fiskivinnuøkinum. Vit kunnu m.a. vera við til at troyta fiskastovnar á djúpum vatni sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, sum er sera væl nøgdur við ferðina í India**

**INDIAFERÐ**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Henda ferð hevur bara sannført meg um, at tað var røtt avgerð at velja India, nú tá so nógvir føroyskir vinnulívsmenn skuldu fáa eitt innlit í, hvussu altjóðagerðin fer fram. Hetta er eitt land, sum lutvíst hevur heilt fitt av møguleikum fyri samstarvi millum føroyskar fyritøkur og indiskar, her ikki minst á fiskivinnuøkinum sigur ein vælnøgdur bankastjóri eftir at hava ferðast til fimm býir í India seinastu 12 dagarnar.

Janus Petersen sær sera stórar møguleikar fyri fiskivinnusamstarvi: – Her er ikki bert talan um fiskaframleiðslu á landi men so sanniliga eisini innan fiskiskap. Tað er heilt spennandi. India hevur eitt sera stórt havøki, sum ikki er serliga væl troytt. Fiskivinnan er enn á einum byrjunarstøði, har tað mest verður fiskað við smærri førum á tí grunna vatninum, meðan djúpa vatnið er lítið troytt. So her eru avgjørt møguleikar fyri føroyska fiskivinnu. Tað er greitt, at fiskivinnan í India er á einum sera lágum triðjalands støði, og vóru indarar eisini sera áhugaðir fyri gongdini á fiskivinnuøkinum í Føroyum, tí teir m.a. hava sera vánalig amboð. Her hava vit veruliga møguleikar eisini at læra indarar nakað. So altjóðagerðin gongur báðar vegir.

Men tað eru eisini møguleikar at gera íløgur í India. Alt fleiri gera íløgur í indiskt vinnulív, sum er í stórum vøkstri. Tískil veksur børsurin eisini við tí rúkandi ferð, og fyritøkurnar hava eina sera góða inntjening. So her er talan um ein búskap, sum er í stórum vøkstri. Janus Petersen sigur, at hetta økið er nakað, sum bankin fer at hyggja nærri at.

Undir vitjanini vóru Janus Petersen og Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún eisini úti og vitjaðu eina sildamjølsverksmiðju. Hon var sera primitiv og var hon eitt gott dømi um, hvussu stórt gapið er millum fiskivinnu í India og so í Føroyum. So tað er nógv vit í Føroyum eisini kunnu læra indarar. Men á nógvum øðrum økjum er India so nógv nógv frammanfyri okkum og onnur lond, her serstakliga innan kunningartøkni, ráðgevaratænastur og bilídnað. Kenslan tú hevur eftir slíka ferð er, at India er eitt sera samansett land. Tað er bæði eitt menningarland og eitt ógvuliga ríkt land. Og hetta kann vera ein sera góð kombinatión, tá Føroyar vil knýta sambond er vera partur av altjóðagerðin sigur stjórin í Føroya Banka.

## Tjaldur møguliga gera íløgur í India

**INDIAFERÐ**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Hetta hevur verið ein sera áhugaverdur og gevandi túrur. Tað tú hevur hoyrt og lisið um, verður nógv meira ítøkiligt, tá tú sjálvur kanst vitja eitt land sum India og har tú sær, hvussu altjóðagerðin virkar í verki. Hetta sigur Líggjas í Bø, nevndarformaður í íløgufelagnum Tjaldur, sum var partur av føroyska ferðalagnum í India. Líggjas í Bø heldur India verða rættað plássið at vitja, skulu vit gera okkum tankar um at vera við í altjóðagerðini. Hann heldur ferðina vera sera væl fyrireikaða.

*Men hvat kann Tjaldur brúka henda túrin til?*

– Tað vil tíðin vísa, men tað er als ikki óhugsandi, at Tjaldur fer at gera íløgur í India.

## Indiskur áhugi fyri Føroyum sum ferðamannaland

**Føroyska vitjanin í India hevur skapt áhuga fyri Føroyum sum ferðavinnuland. Hesin fyrispurningurin kom í gjár til Sámal Bláhamar hjá Toru Tourist:**

*Dear Sir*

*I am H.G. mailing from India. Recently Faroe Prime Minister had visited India, and thus we came to know about This Island in Europe. I am operating a reputed tour company in India. By hearing about Faroe, I am really interested in Visiting the Island, as tourist, and study more about the island. Kindly let me know the Visa formalities to enter the country, and different options of accommodations to stay there for a couple of months. We are interested in establishing some business tie-ups too.*

*Expecting an earlier reply from your end.*

*Thanks & regards*

*H. G.*

Hesin harra H G vísir á, at í sambandi við at føroyski forsætisráðharrin hevur vitjað India frætti hann um hetta oyggjalandið í Europa. Hann stendur fyri eini ferðaskrivstovu og eftir at hava hoyrt um Føroyar vil hann fegin koma henda vegin. Hann vil eisini menna handilssamstarv.

# India – á veg millum stórveldi?


BOGI ELIASEN
cand.scient.pol

**India er á breddanum í hesum døgum. Her heima hjá okkum tí at ein sendinevnd er farin til India, og úti í heimi tí at forsetin í USA, George Bush, júst hevur verið á vitjan og m.a. undirritað eina avtalu um kjarnorku**

## Heimsins størsta demokrati

Men hvat er India? India er í dag heimsins størsta demokrati, og bleiv savnað sum eind sum bretskt hjáland. Landið fekk ikki fullveldi, fyrr enn tilgongdin at taka av hjálandaveldini veruliga tók dik á seg aftaná Seinna Veraldarbardaga. Úr nýggjaru søguni vita vit nakað um drúgva stríðið hjá Mahatma Gandhi fyri bæði at vinna India fullveldi, men samstundis at gera tað soleiðis, at ymsu tjóðirnar og átrúnarligu bólkarnir kundi liva í friði saman. Við yvir einari milliard íbúgvum er talan um eitt sera fjølbroytt land. Tær orrusturnar vit hoyra mest um er t.d um Kashmir. Pakistan var upprunaliga ein partur av India, men bleiv líkasum tað muslimska landið, og komu muslimar úr øllum India til Pakistan, tá landið Pakistan sá dagsins ljós. Stóri meirilutin er hindu, men eisini ein rímiligur minniluti av sikkhum eru í India, og tað er tann orrustan vit hava hoyrt mest um í India. Ikki minst tí at Indira Gandhi legði eftir sikkum og bleiv eisini dripin av sikkum.

## Stjórnarskipan

India verður kallað heimsins størsta fólkaræði, og er landið eitt sambandsríki, sett saman av federalum eindum. Federalu statirnir eru 28 í tali, umframt 6 sonevnd Union Territories. Munurin millum statirnar er stórur, og hóast India vanliga verður sætt sum eitt miðsavnandi sambandsríki, so er munurin stórur á lógum og reglum í ymsu statunum. T.d. eru summir statir munandi meira marknaðarbúskaparligir enn aðrir. Sambært t.d. The Economist merkir tað, at nógvir økisflokkar hava vunnið frama seinnu árini. Í nógvum økjum eru eisini ynskir um víðkað sjálvstýri og/ella fullveldi.

## India og búskapur

India gjørdist fullveldisland í 1947. Tveyhundrað árini frammanundan var India eitt bretskt hjáland. Í byrjanini av fullveldistíðini var India búskaparliga vinstrahalt, og enn eru fleiri kommunistiskir flokkar. Kongressflokkurin, sum situr á valdinum nú, er í samgongu við kommunistiskum flokkum, og m.a tí gongur striltið at gjøgnumføra búskaparligar broytingar ávegis einum indiskum marknaðarbúskapi. T.d blivu liberaliseringar framdar í flogferðslu, telefonkervi og bygningsvinnu í 2005. Men síðan hevur verið politiskt ósemja um ella hvussu haldast skal fram.

## India og handilsavtalur

Sum tað hevur verið frammi, so hevur India dupultskattaavtalu við Føroyar.

Sambært handilsdeildini í Indisku stjórnini, so hevur India bert fríhandilsavtalu við Sri Lanka, handilsavtalur við Bangladesh, Bhutan, Ceylon, Maldiverne, Kina, Japan, Suðurkorea, Norðurkorea, Mongolíi og sonevndar preferential trade agreements (PTA) við Kili, Mercosur og Afghanistan. Síðan eru rammuavtalur við GCC londini (arabisku flógvalondini), ASEAN, Teiland og Kili.

## Tollur og skattur

India hevur, í heimshøpi, ein rættiliga høgan innflutningstoll.

Sambært tradeportal of India, so verður allur innflutningur tollaður við millum 5 og 35% og er miðaltollurin 15%. Hóast hetta tykist høgt, so er talan um úrslit av miðvísari lækking av tolli, har hægsta mark er lækkað frá 150% í 1991 (sum eisini var ein lækking) til 35% í dag.

Inntøkuskatturin er progressivur upp til 30%. Virkir gjalda 35% + 2,5% av goldna skattinum. Útlendsk virkir gjalda 40% + 2,5 %.

India hevur sostatt verið eitt afturlatið land. Seinni árini hevur verið arbeitt við at lata landið upp og at hava ein marknaðarbúskap. Tað almenna spælir enn ein týðandi leiklut á marknaðum, m.a. í figgjarheiminum.


*Mahatma Gandhi*


*Indira Gandhi*


*Sonja Gandhi*

At torført kann verða at einskilja, vita vit alt um, men útlendski áhugin í India er stórur og ynski um útlendskar íløgur setir eisini krøv til landið, sum sjálvt er áhugað í meira dynamikki og útlendskum kapitali.

## Singh ístaðin fyri Gandhi

Núverandi forsætisráðharrin sat sum fíggjarmálaráðharri frá 1991 til 1996, og verður mett at hann er arkitekturin aftanfyri tað ovurstóru framgongd, sum hevur verið seinastu árini. Hann hevur eisini roynt at bent búskapinum tann liberala vegin. Tað lá tó ikki í kortunum, at hann skuldi gerast forsætismálaráðharri, tí kongressflokkurin stillaði upp við Soniu Gandhi sum høvuðsvalevni. Hon er verdóttir Indiru Gandhi og einkja eftir Rajiv Gandhi. Sonia er følld italieni og var tað eisini kritikkurin av henni. m.a. tí at harða stríðið var millum kongressflokkin hjá Gandhi, sum er at kalla altumfevnandi, og so tjóðskaparliga hinduflokkin. Tá at hon, ella flokkurin við henni á odda, hevði vunni valið, tók hon ikki av at gerast forsætismálaráðharri, og tí fall valið á Singh. Forsetin, ið ikki hevur so stórt vald, er muslimski Abdul Kalam og kendur sum heilin aftan indisku missilskipanina.

## 10. størsti búskapur

Sosialu trupuleikarnir í India eru enn stórir. Hóast arbeitt hevur verið við at uppløysa kastuskipanina, hevur tað ikki heilt eydnast. Undirstøðukervið er ikki nóg væl útbygt og stórur eftirspurningur er eftir t.d fartelefonum. Landið hevur 10. størsta búskapin í heiminum, og verður roknað sum ein av framtíðar sterku leikarunum á alheimspallinum. Landið hevur staðið seg væl í at fáa útflaggaðar vinnur til sín, og hevur eina stóra og vælútbúnað arbeiðsmegi (í tali) at seta inn í alheims kappingina, men hevur trupulleikar av ikki at verða nóg væl útbygt.

Landbúnaðurin hevur enn stóran týdning og fevnir um ein fjórðing av BTÚ. Ídnaðurin er latin upp fyri útlandinum, men ein stórur partur er tó enn almenn ogn . Sambært The Economist, so eru tað tænastur sum eru drívmegin í indiska búskapinum. Vælkenda dømi er m.a. Bangalore, sum er kent sum indiska Silicon Valley.

## Framtíðin

Stóra avbjóðingin liggur í at menna alt landið, tí munurin millum rík og fátøk er stórur, eins og at munurin millum sambandslondini er stórur, og at leisturin tey ynskja er ymiskur. India er m.a. spennandi, tí talan er um ein sera stóran marknað við yvir einari milliard íbúgvum. 2/3 arbeiða enn í landbúnaðinum og nógv hava vánaligar liviumstøður. Búskaparvøksturin er stórur, og um so er at miðalkeypiorkan veksur, gerst India ein av teim áhugaverdu marknaðunum í heiminum, sum eisini hevur fingið staðfest sína tyngd, við at koma við í kjarnorkuklubban.


*Taj Mahal í India*

## FAKTA

**Íbúgvar:** 1,8 milliard
**Støðd:** 3,287,590
**átrúnaður hindu:** 80,5%, **muslimar:** 13,4%,
**kristin:** 2,3%,
**sikkar:** 1,9%
**Fólkavøkstur:** 1,5% (2001-05)
**Búskaparvøkstur í miðal:** 6,8% síðan 1994
**Sambandslond:** 28 umframt 7 union teritories
**Forseti:** Abdul Kalam
Forsætismálaráðharri: **Manmoham Singh**